# VARPIÐ




SvF • Sunnudag 13. kl. 20.50

**»Kongemordet« - dansk/svenskt krimi 1:4**

Danska Hanne-Vibeke Holst hevur skrivað bestseljaran, sum er grund undir hesi svenskt framleiddu krimirøð. Valkvøld 2006 – tað er greitt, at javnaðarflokkurin hevur haft eitt vanlukkuligt val. Og í leiðsluni er nú opið stríð. Fíggjarmálaráðharrin, javnaðarmaðurin Gert Jakobsson trínur fram sum formansvalevni. Men hann goymir ein myrkan loynidóm, sum ikki tolir dagsljós.



SvF • Mánadag 14. kl. 21.05

**Mamma er í kríggi í Irak – Fr. Dok. frá 2006**

20.000 kvinnur eru í amerikanska herinum, og tað er umleið 15% av samlaða talinum. Síðan 20. september 2001, tá kríggið móti yvirgangi brast á, hava 41.000 kvinnur verið við herinum í Afghanistan og í Irak. Meðalaldurin er 23 áar og flestallar eru giftar og eiga børn.



Tv3 • Hósdag 17. kl. 21.45

**»Sex & the City«**

Hetta er parturin, tá ið Samantha avdúkar, at hon aftur er saman við Richard – vinkonurnar eru ikki samdur um, hvørt hetta er eitt gott hugskot ella ikki. Og Carrie gerst ikki sørt bilsin av blaðstjóranum hjá sær.

TELEVARPIÐ

Sosialurin

**Fríggjadagur 11. apríl 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**